# TEPPI HJÁ GJÁAR MIU



*Í vikuni vóru húsfólk av Ellisheiminum í Havn,og vitjaðu áhugaverdu framsýningina, sum er í Norðurlandahúsinum. Tá sjónvarpið hevði ein tíðindastubba um framsýningina, vóru fleiri av húsfólkunum, sum ikki kendist við navnið Katrina Maria Hansen, sum millum fólk flest er betur kend sum Gjáar Mia. Í mong ár vitjaði Gjáar Mia Ellisheimið saman við fólki frá KFUK, sum javnan koma at hava andakt á heiminum. Onkur visti at siga teimum, at har vóru teppir o.a., at siggja sum teirra Gjáar Mia hevur gjørt . Tey fóru so í Norðurlandahúsið og vóru sera hugtikin.*

# Hevur ampa av høgum grannagarði

**Domenico Stefania góðtók ikki, at grannin bygdi ein høgan garð og tók útsýnið hjá honum av Argjum til Havnar. Málið er í rættinum**



Randi Jacobsen

Í seinastu viku var læknin Domenico Stefania, sum áður arbeiddi í Føroyum, aftur her og vendi.

Ørindini vóru, at hann skuldi møta í rættinum, tí hann hevur stevnt grannanum og Tórshavnar kommunu í einum byggimáli.

Men mótparturin møtti ikki.

Hann brúkti tí alla tíðina til at tøma hús síni á Argjum. Hann og konan eru flutt til Noregs, har hann hevur fingið gott arbeiði.

Um hann flytir aftur til Føroya, veit hann ikki, men hann hevur í hvussu er ikki hug at búgva í húsunum á Argjum, orsakað av grannastríði.

Men sárt er kortini at fara frá húsunum, sum hann keypti í 2003. Tey hava gjørt stóra íløgu í húsini og ikki minst í økið uttan um húsini. Har hava tey plantað, gjørt gosvatn við vatnplantum í, og túnið niðan fyri húsini er steinsett. Stóra stoypijarnsportrið inn til økið teknaði Demenico Stefani sjálvur og fekk tað gjørt í Bretlandi fyri 50.000 krónur.

## Óskilligt

Hann hevur framvegis ikki skilt, at kommunan ikki steðgaði grannanum við síni bygging, ið hann sigur vera ólógliga.

Upprunaliga ætlaði grannin at byggja eitt stórt átta metrar høgt bilhús og at byggja í mark.

Domenico Stefania mótmælti við tí grundgeving, at hann fór at missa útsýnið, og hann mælti grannanum til at gera bilhúsið oman fyri húsini, men tað vildi grannin ikki.

Sambært Domenico Stefania fekk grannin loyvi til at gera altan, men umframt altanina gjørdi hann eisini ein vegg út frá húsunum, soleiðis at Domenico Stafania ikki kundi hyggja inn, men læknin misti eisini vakra útsýnið yvir móti Havnini.

– Eg haldi meg einki galið hava gjørt. Eg vísi bara til byggisamtyktina fyri Argir, sigur Domenico Stefania.

Hann hevur fleiri ferðir roynt at tosa við kommununa, men tað hevur einki útslit givið.

Tí fekk hann sær sakførara og stevndi grannanum og kommununi.

Málið hevur kostað honum nógv, tí sakførараútreiðslurnar má hann gjalda, og hann er bangin fyri ikki at fáa nóg mikið fyri húsini, soleiðis sum støðan er.